Salongfrúgv

Síðan 1995 hevur týski yrkjarin Ulrike Marie Hille hildið bókmentaliga salong í húsum sínum í Bremen

Eftir Hanus Kamban

Tann, sum ætlar sær at koyra eftir teimum týsku motorvegunum, veri við hesum ávaraður. Víst ber tað til, men tað kann vera fløkjaligt og møtimikið. Summastaðni koma frákoyringarnar tætt í tætt sum hin vangagrái, tá ið væl flýgur, aðrastaðni eru heil tyssir av høvuðsvegum, sum umskarast.

Her kemur tað nýggja GPS-tólið væl við, henda alvitandi, fylgisveinastýrda røddin, sum heldur skil á frákoyringum, síðuvegum og rundkoyringum, sum uttan himpr kemur tær til hjálpar, tá ringast er statt, og fylgir tær á títt mál. Áhaldin er hon, tað skal hon eiga, og ongantíð missir hon tolið við einum. Bara tá ið vegarbeiði er ella onkur onnur forðing, og ein situr innilæstur í steikjandi hita mitt í einum bilhala, sum tykist røkka um alt Europa, noyðist eisini GPS-tólið at leggja kongin.

Vit koma av europaferð. Tað sædda livir enn við sítt fríska lív í minninum. Pakkhúsini í Antwerpen, tað velduga havnaumráðið, likkurnar gólandi yvir tí breiðu Schelde-ánni, dómkirkjan við Grote Markt, við fýra lýsandi meistaraverkum eftir Rubens, sum siga frá Jesu krossfesting og uppreisn. Prentsmiðjan hjá Plantin og Moretus, ein tann størsta í Europa seinast í 16. øld, sum er varðveitt, og har tú kanst síggja øll umførini í prentgongdini, umframt matrisur, stavir, rættlesarahølir og prentlutir, teirra millum sjáldsamar útgávur av Halgubók og av verkum eftir Augustin.

Og, ikki minst, tann stórfingna Caspar David Friedrich-framsýningin í Essen, har teir bestu málningarnir føra áskoðaran aftur til romantiska tíð, tá berg, trø og gjáir bóru gandakápu og tóktust venda sær til menniskjað við tigandi, men myndugari talu. Ofta venda fólk á hansara málningum áskoðaranum bakið, sum bíða tey spent eftir, at okkurt tjald verður drigið frá. Men náttúrunnar loyndarmál verður verandi dult.

Ein gamal hansabýur

Um nýggjutíðina á kvøldi sneiða vit av motorvegnum og halda leiðina inn í tann gamla hansabýin Bremen, hvørs erkibiskupur (sum eisini hevði sæti í Hamburg) til 1104 hevði ræði yvir øllum biskupssetrum í Norðurlondum. Vit koyra inn í býin, sneiða inn á ein trongan síðuveg og steðga, vandaliga vegleidd av okkara holla fikku-tólmenni, uttan fyri eini hús í trimum hæddum, við trappu niðan móti úthurðini og rimaverki og portri úr jarni niðast.

Kvinnan, sum nakað seinni letur hurðina upp og tekur ímóti okkum, er um tey seksti. Hon hoyrir 21. øld til, eingin ivi um tað, og kortini eru yvir henni ein tign, ró og elegansa, sum tykjast sprottin úr eldri jørðildi, og gjøgnum hugan strúka gloymd nøvn, við patina av fortíðar mentaðu keipum og medferð. Ellen Key, Rahel Varnhagen, Lou Andreas-Salomé.

Vit verða boðin inn í eini hús úr 19. øld, við háloftaðum stovum, antikkum innbúgvi, og høgum bókahillum. Stovan er býtt sundur í eitt høvuðsrúm og eitt eitt sindur minni arbeiðsrúm við kúputum vindeyga út ímóti gøtuni. Í hesum rúminum eru tvey smærri borð og eitt klaver. Yvir stovuni sveimar ein andi av lættleika og frælsi. Á einum skrivarborði síggi eg m.a bókina *Der neue Conrady*, eitt savn av týskum skaldskapi, og *Eros und Literatur*, eitt akademiskt heiðursrit, við greinum um ástarskaldskap frá klassiskari tíð og fram at okkara døgum, ognað Gert Sauermeister, professara í týskum bókmentum við lærda háskúlan í Bremen. Á einum borði í ganginum liggur tað nýggjasta nummarið av blaðnum *Die Zeit*.

Ulrike Marie Hille

Okkara vertur eitur *Ulrike Marie Hille* og er týskur yrkjari. Hennara fyrsta yrkingasavn, *Möglichkeiten des Wiedersehens* (Møguleikar fyri at síggjast aftur) kom út í 1984. Eitt av hennara seinnu søvnum hevur heitið *Überlebensfluglied* (Lívsflogsangur) og kom út í 2003. Men umframt at vera skald hevur Ulrike Marie Hille tey seinastu tjúgu árini havt ein yrkjaraverkstað, eitt slag av bókmentaligum skúla, í húsum sínum í Bremen.

Saman við høvundinum umborð á tí lítlu Weser-ferjuni.

Hille hevur ta grundáskoðan, at bókmentir eru ikki bara ein fagurfrøðilig listagrein, men at tekstir, bæði í bundnum og óbundnum máli, hava funktionellan týdning, kunnu grøða, kunnu skapa linna hjá menniskjum, sum eru nívd av kreppu ella strongd. Hennara virki sum undirvísari er grundað á tríggjar høvuðssúlur. Hon leggur seg eftir at læra av gomlum mentanum og kunna seg við teirra sagnir, dansir og kvæðir. Í øðrum lagi leggur hon seg eftir at flætta dans, rørslu og stev inn í sína undirvísing, sambært teirri hugsan, at rørsla bæði kann rína við skaldskapin og grøða sálina. Í triðja lagi brúkar hon í sínum virki innlit og royndir frá nútíðar sálarfrøði, kanska serliga frá Jung og *gestalt*-sálarfrøðini.

Salongmentanin

Men Ulrike Marie Hille hevur eisini annað at borðreiða við. Í húsum sínum í Bremen hevur hon nevniliga eina ferð um mánan *bókmentaliga salong*. Hon er ein av fleiri kvinnum í Týsklandi, sum tey seinastu árini hevur tikið henda gamla mátan at vekja áhuga fyri bókmentum uppaftur.

Salongmentanin varð til í Fraklandi longu í seinnu helvt av 16. øld. Men ikki fyrr enn